# Sørvingar satsa

**Teir, sum í fjør fóru undir ferðavinnutilttakið Blue Gate í Sørvági, hava so góðar vónir, at teir longu nú byggja út**

FERÐAVINNA
*Edvard Joensen*

**Sørvági:**
Í kavaælingini eina viku inn í apríl, stendur eitt einsamalt grátt hús við omankoyringina til bátahylin í Sørvági. Tað skal nú pussast upp til at gerast ferðafólkamiðstøð í Sørvági.

Við bryggju í Runavík liggur ein 33 fót AWI bátur við navninum Skarvur. Hann er komin úr Sørvági til at verða longdur og fáa nýggja maskinu í smiðjuni hjá Aðalstein Anthoniussen, áðrenn hann í næsta mána aftur fer at sigla við ferðafólki. Eisini verða slengrikjølar settir á bátin, nú hann fer í smiðjuna í Runavík

Tey trúgva upp á ferðavinnu í Sørvági, sigur Hans Poulsen, sum er ein teirra, sum í fjør fór undir at sigla við ferðafólki undir Sørvágsbjørgunum og á leiðunum har vestanfyri.

### Størri Skarvur

Teir byrjaðu við glastrevjabátinum Skarvi, sum er ein 33 fót AWI bátur, sum teir ruddaðu dekkið á og settu beinkir í, áðrenn farið varð at sigla seinasta summar. Báturin hevði loyvi at flyta 12 ferðafólk í senn.

Hans Poulsen sigur, at royndin, teir gjørdu í fjør, eydnaðist hampiliga væl. Hóast teir byrjaðu nakað seint og ikki gjørdu so øgiliga nógv við at lýsa við tiltakinum, fingu teir pengarnar, teir settu í tiltakið, innaftur.

Tað hevur so givið teimum vón um, at tað eigur at bera til skapa eina inntøkukeldu burtur úr at sigla við ferðafólki um summarið.

Skarvur er nú í Runavík, har hann skal leingjast fimm føtur, sum svarar til umleið hálvanannan metur.



Blue Gate hevur keypt hús beint við bátahylin í Sørvági. Húsini skulu nýtast til ferðafólkafarstøð í samband við túrarnar hjá Skarvi. Eisini ber til at gista í ovaru hæddini
Mynd: Edvard Joensen



*Eitt av ferðamálunum, siglt verður fram við á túrunum við Skarvi undir Vágalandinum, er Sæurðardrangur norðanvert Gásadal*
Mynd: Edvard Joensen

Eisini skal hann hava nýggja maskinu. 450 hestakreftir verða settar í hann, og tað fer at gera, at hann eitt nú kann klára túrin til Mykinesar upp á ein hálvan tíma, sigur Hans Poulsen.

Í fjør varð siglt fyrrapart og seinnapart. Tríggir ymsir túrar stóðu á skránni. Alt eftir ætt og veðurlíkundum annars kundi farast undir Sørvágsbjørgini fyri sunnan í Vágum, ein túr kring Mykines ella ein túr norður um at síggja Víkarnar og tað, har er at uppliva.

Í summar ætla teir umframt at satsa upp á ein kvøldtúr, sum fer at byrja úr Sørvági klokkan 20 á kvøldi. Siglt verður so eftir sólsetrinum. Eitt nú er túrurin kring Mykines í slíkum líkindum sera vakur. Teir fara at hava turra grind, turran fisk og heit eplir við á túrin, og lagt verður inn í Borgargjógv eystantil undir Mykinesi, at eta, sigur Hans Poulsen.

Borgargjógv er ógvuliga vælegnað sum veitsluhøli. Har er steindeytt innan fyri drangin, hóast tað rekur sum eftir ánni beint uttan fyri Falltanga.

Skarvur verður bara brúktur til ferðafólkasigling um summarið. Um veturin rør hann út úr Sørvági, og tað, at hann verður longdur nú, fer eisini at økja mungandi um lastakapasitetin. Einar seks kassar vænta teir at kunna hava afturat í lastini, sigur Hans Poulsen.

### Farstøð við bátahylin

Umframt at leingja Skarv og seta nýggja maskinu í hann, hava teir, sum eiga felagið Blue Gate, eisini gjørt seg út uppi á landi i samband við ferðavinnuna í Sørvági.

Teir hava keypt eitt hús, sum stendur beint við omankoyringina til bátahyln í Sørvági, har Skarvur vanliga liggur.

– Vit ásannðu beinaveg, at tað ber ikki til at lata fólk standa og bíða við ein naknan bátahyl, sigur Hans Poulsen. Teir hava tí fingið hendur á hesum húsinum, sum teir beinanveg fara undir at pussa upp.

– Tað er í grudnini ikki so øgiliga nógv at gera við tað, greiðir hann frá. Eitt sindur av máling fer at gera udnurverk.

Niðara hæddin verður so innrættað til bíðirúm, har fólk kunnu sita. Ovara hæddin er longu innrættað við køki, stovu, tveimum kømurum og wc. So har ber væl til at leiga út til fólk, sum eitt nú kundu hugsað sær at hildið eitt vikuskifti í Sørvági, sigur hann.

Hann roknar við, at alt hetta verður liðugt um somu tíð, sum Skarvur kemur aftur úr smiðjuni. Tað er sett til 25. mei, sigur Hans Pouslen.



*Skarvur er farin til Runavíkar, har hann skal leingjast*
Mynd: Vilmund Jacobsen

# Makrel og Kristleif sleppa eisini

**Nógv kjak stóðst av dømingini við Prix Føroyar-hálvfinaluna, tá dómur varð avsagdur. Makrel og Kristleif komu millum aðrar ikki víðari til Altantic Music Event, har endaligi vinnarin av Prix Føroyum verður funnin. Men nú er greitt, at Makrel og Kristleif hóast alt vera við í Atlantic Music Event tann 23. apríl**

PRIX
*Hans Kárason Mikkelsen*
*hans@sosialurin.fo*

- Altantic Music Event er líka so nógv, og kanska meira, eitt showcase, har vit gera eitt gott sjónvarpskvøld. Vit hava bjóðað útlendskum gestum at fáa ein smakk av føroyskum tónleiki generelt. Tað vil siga, at vit hava loyvi til at bjóða so nógvum bólkum, sum pláss er fyri eitt slíkt kvøld, sigur Fróði Vestergaard, samskipari.

Makrel og Kristleif eru altso bjóðaðir við í Atlantic Music Event. Dømingin við Prix Føroyar-hálvfinaluna stendur við, tí dómur kann ikki broytast, men føroyingar sleppa kortini at hoyra Makrel og Kristleif.

### Onki við dømingina at gera

Men er hetta ein háttar at rættvísgera ta dømingina í hálvfinaluni, sum varð so nógv umrødd? Fróði Vestergaard sigur, at hesi bæði tingini hava onki við hvørt annað at gera.

- Tað er onki við at rættvísgera nakað sum helst. Altantic Music Event roynir at fáa tónleikin fram og præsentera. Tað verða kanska serliga nakrir bólkar, sum hava givið fløgur út, ella sum eru fløguaktuellir. Tað vil siga, at tað eru bólkar, sum peika frameftir, og sum eru seriøsir og vilja nakað í framtíðini. Tað hevur onki við nakað press ella ónøgd við dømingina at gera, sigur Fróði Vestergaard, samskipari.

Altantic Music Event verður tann 23. apríl. Har verður tann endaligi Prixbólkurin avdúkaður; tað vil siga tann endaligi vinnarin av teimum trimum, sum komu víðari úr Prix Føroyum-hálvfinaluni. Umframt tað verða ymiskar heiðurslønir lætnar fyri bestu fløguna og ymiskt annað.

### Hugsa um breiddina

- Vit skulu hava eitt kvøld, sum hevur eina breiða tónleikaliga dygd. Og tí fingu vit ikki ordiliga valt tað endaliga programmið til Atlantic Music Event fyrrenn aftaná Prix Føroyar-hálvfinaluna, tí tá vistu vit, hvør var komin víðari frá hálvfinaluni. Um tað vóru nakrir harðir bólkar, so høvdu vit kanska valt nakrar aðrar meira bleytar bólkar at verið við eisini. Og umvent, nú eru tað kanska nakrir meira traditionellir bólkar, sum komu víðari, og so velja vit kanska okkurt, sum er eitt sindur meira alternativt fyri at præsentera breidduna. Men vit hugsa sera nógv um, hvat bólkarnir vilja; hvørjar ambitiónir teir hava. Um teir veruliga vilja satsa upp á tónleikin, og um teir vilja gera alt tað, sum skal til, fyri at koma fram, sigur Fróði Vestergaard, samskipari.

### Toppurin í Føroyum

Altantic Music Event er eitt sjálvstøðugt tiltak. Prix Føroyar er næstan liðugt. Vinnarin skal finnast við Altantic Music Event, men hetta er bert ein lítil partur av skránni. Fleiri aðrar framførslur vera á skránni. Millum annað 200, Týr, Gestir, Eivør, Høgni Lisberg, Eyðun, Terji, Go Go Blues, og sum nevnt Kristleif og Makrel. Samskiprarnir arbeiða eisini við at fáa Guðrun Sólju til Altantic Music Event.